# KT2004 síðurnar



Í hesum og komandi bløðum setir Sosialurin sjóneykuna á stevnuna KT2004, sum verður í Norðurlandahúsinum 22. og 23. apríl. Fyrilestrar verða umrøddir, og virkini verða lýst.

Høvuðstuðlar: ATLANTIC AIRWAYS, bp, Tryggingarfelagið FØROYAR - so ert tú tryggari, Microsoft

# IBM er vegurin og sannleikin

**Kervi hevur sett sær sum mál at gera Føroyar til eitt betri samfelag við kunningartøkni. Við at skapa e-business og e-government skipanir til tað almenna kann orka frígevast til betri tænastur og nýskapan. IBM er svarið!**

"Sannleikin finst í IBM. Vit eru vegurin, og vit vilja umvenda allar føroyingar."

Álvari liggur undir hvørjum orði, tá ið teir báðir Óli á Deild Olsen og Jónsvein Joensen, ávikavist stjóri og menningarleiðari á Kervi, skemtiliga seta orð á sína fyritøku.



*Hundraðtals milliónir kunnu frígevast hjá tí almenna, siga Jónsvein Joensen og Óli á Deild Olsen.*

Smápartafelagið Kervi er einasta IBM Advanced Business Partner í Føroyum og leggur seg eftir at umboða alt tað, sum teldurisin stendur fyri. IBM, International Business Machines, stavar úr Amerika, hevur 80 ár á baki og er heimsins størsta KT-fyritøka. Meira enn 350.000 starvsfólk starvast tilsamans fyri "the Big Blue".

Kervi er eitt sjálvstøðugt virki, men øll IBM-umboð eru sokallaðir Busines-partnarar. Hetta alheims netverkið, ella kervið um tú vilt, hevur sum orðaðan málsetning at hjálpa og stuðla hvørjum øðrum. Allar skipanir, sum Kervi mennir til sínar kundar, skulu eitt nú góðkennast av IBM, og tað er eitt góðskustempul í sjálvum sær.

— Velur tú Kervi, so velur tú eisini IBM. Okkara kundi fær alt netverkið, sum vit dúva uppá, og harvið fær hann eisini vitanina hjá heimsins størstu KT-fyritøku, sigur Óli á Deild Olsen, stjóri.

## Ráðgeva og loysa

Kervi hevur góð trý ár á baki. Óli Olsen og Jónsvein Joensen kendust og høvdu starvast saman áður. Jónsvein hevur arbeitt hjá IBM í Danmark og teir báðir sannførdu "bláu" undraðust á, at heimsins størsta KT-fyritøka einki umboð hevði í Føroyum.

Fyritøkan byrjaði í desember 2001 við sjey fólkum, og nú starvast 11 fólk hjá Kervi í nýggjum húsum við Íslandsvegin í Havn.

Kervi leggur dent á trý høvuðsøki: Tólbúnað, ritbúnað og ráðgeving.

Søguliga hevur IBM lagt seg eftir at røkka stórum og miðalstórum fyritøkum. Nú hevur fyritøkan nýtt fokus. Farið verður til smáar fyritøkur við lagaligum tilboðum, sum bert tær stóru fingu áður. Skipanir verða lagaðar til ítøkiliga tørvin hjá virkinum ella kundanum.

— Vit selja ikki pakkaloysnir. Okkara loysnir byggja á ráðgeving, og vit lata altíð endaligar loysnir til kundan. Vit taka støði í kundanum og laga skipanirnar til hansara tørv. Vit selja sostatt ikki bara edv. Vit selja ráðgeving, og vit selja skipanir. Tí eru okkara loysnir varandi. Velur tú IBM, so velur tú eitt lívlangt hjúnarlag og ikki eitt eingangsfyribrigdi.

Kervi hevur egna menningarstovu, har forrit verða ment og tillagað kundunum. Ein høvuðstáttur er eisini netumsiting, har virki leiga ein teldurøkil til at taka sær av vanligum rakstartænastum.

## Hundraðtals milliónir

Kervi hevur sett sær stór mál: Føroyar skulu gerast til eitt betri og smidligari samfelag við kunningartøkni. Tí leggur Kervi stóran dent á at sleppa inn á almenna marknaðin. IBM hevur góðan førleika á hesum øki, og tørvurin er stórur hjá tí almenna.

Hundraðtals milliónir krónur kunnu frígevast til betri endamál við at seta skipanir í verk í tí almenna, so borgarar sjálvir kunnu avgreiða mál. Ein óneyðuga stór orka verður brúkt til at gera vanauppgávur, sum borgarin sjálvur kundi avgreitt.

— Tìbetur er ein hugburðsbroyting við at koma, tí tað almenna dugir at síggja tørvin og kennir eftirspurning eftir e-business, sum er sjálvsavgreiðsla og annað. Um borgarin kann avgreiða mál sjálvur, frígevur tað orku hjá tí almenna til nýhugsan. Borgarin fær betri tænastu fyri pengarnar, og tað almenna brúkar orkuna og heilakapasitetin skynsamari, siga Óli og Jónsvein.

KERVI teld & tøkni

Stovnað: 2001
Stjóri: Óli á Deild Olsen
Starvsfólk: 11
Virksemi: Tólbúnaður, ritbúnaður, netumsiting, menning og ráðgeving.

# Vunnu stóran heiður við televarpinum

**Haldaraskipanin hjá televarpinum er ment av Kervi. Hon er eitt gott dømi um, hvussu vanabundnar uppgávur kunnu loysast sjálvvirkandi til gagns fyri virki og kunda**

Sjálvsavgreiðsla og sjálvvirkni er søtur musikkur í oyrunum hjá Kervi og IBM. Málið er, at teldur og tól taka sær av øllum teimum vanauppgávum, sum annars krevja fleiri fólk í umsitingini. Kervi samstarvar og ráðgevur, tá ið stovnar og fyritøkur fara undir at rationalisera og gera arbeiðslagið høgligari.

Eitt gott dømi um, hvussu tað verður gjørt, er nógv umrødda Televarpið hjá Føroya Tele, sum í Føroyum hevur fingið kelinavnið frystiboksin. Aðrastaðni er Televarpið eitt heitt hitt í hesum døgum. Suðurlendingar tiðnaðu fullkomliga, tá ið teir sóu, hvussu ómakaleyst skipanin verður umsitin. Haldaraskipanina hevur føroyska IBM-umboðið Kervi ment.

Skipanin er so mikið áhugaverd, at Føroya Tele hevur fingið fleiri fyrispurningar uttanlands, og gongst væl, kunnu fleiri stórar uppgávur koma í kjalarvørrinum á stóra handlinum, sum Føroya Tele fekk um Televarpið.

Skipanin, sum Kervi hevur ment, snýr seg í stuttum um at minka sum mest um umsitingina av televarpinum við at gera uppgávurnar sjálvvirkandi.

Haldaraskipanin stýrir øllum sjálv. Kundin verður skrásettur í skipanini beinleiðis hjá seljara, og síðan verður hann stovnaður í kjarnuskipanini hjá Kervi. Skipanin letur rásirnar upp, so kundin sær tað, hann hevur teknað hald fyri. Peningurin til mánaðarliga haldaragjaldið verður tikin av konto hjá kunda og innlisin í skipanina. Verður peningur ikki goldin, so verða rásirnar av sær sjálvum stongdar, til peningur aftur er inngoldin.

Alt hetta verður gjørt, uttan at persónar verða íblandaðir, og skipanin hevur spart Føroya Tele fyri nógv eyka starvsfólk í umsiting. Ella sagt øðrvísi: Starvsfólkini kunnu nýta orkuna upp á aðrar meiri spennandi og mennandi uppgávur.

- Hetta vísir, hvat kann fáast burturúr, tá ið eitt virki fer við opnum sinni til eina KT-fyritøku og biður um hjálp og ráðgeving, sigur Óli á Deild Olsen, stjóri á Kervi.

Kervi hevur aðrar líknandi uppgávur, sum verða fyrireikaðar í løtuni. Arbeitt verður við at skipa eina sjálvavgreiðslu í Bileftirlitinum, sum ger handahóvsarbeiði óneyðugt. Søtur sjálvvirkandi musikkur.



# GVB-skipanin er veruleiki

**Flaggskipið hjá lítlu klaksvíkarfyritøkuni, Hansoft, er ein samskipað goymslu-, viðskifta- og bókhaldsskipan**

Í húsinum við Klaksvíksveg 77 situr stjórin, Esbern Hansen, og gleðir seg til KT-stevnuna. Saman við trimum øðrum fólkum myndar hann fyritøkuna, Hansoft, sum hevur fingið sær skraddaraseymaðar dátugrunnar sum sergrein. Slíkum hevur Esbern arbeitt við seinastu 9 árini.

Eingin ivi er um, at skraddaraseymaðir dátugrunnar eru styrkin og bulurin í lítlu fyritøkuni. Tað er ein styrkur at kunna gera skipanir, ið passa til fulnar júst til ávísa virksemið hjá ávísu fyritøkunum. Vinningurin er ofta, at virksemið í fyritøkuni verður effektiviserað munandi.

Spenningurin í Hansoft í hesum døgum hevur kortini samband við annað enn dátugrunnar. Hann er elvdur av spildurnýggju GVB-skipanini, ið er ein samskipað Goymslu-, Viðskifta- og Bókhaldsskipan. Hesa skipan hava Esbern og tey brúkt seinastu árini at menna. Tey á Hansoft vænta, at GVB-skipanin fer at draga til sín flest forvitin á KT-stevnuni. Esbern Hansen ivast ikki í, at leggja umboðini fyri virki og stovnar merki til teirra GVB-skipan, er Hansoft væl við.

Sjálvur heldur hann, at tann parturin av skipanini, sum eitur Viðskiftaskipanin og skal brúkast til kundarøkt, er góður. Henda skipanin ger, at fyritøkur m.a. kunnu hava øll skjøl, alt samskifti og allar kontur, ið hava samband við kundan, undir einum. Hetta heldur Esbern vera týdningarmesti kappingarparameturin í samlaðu skipanini. Hartil er at siga, at skipanin er einføld at nýta, tí hon er tengd at Microsoft Office, ið fólk flest nýta, og sum er lætt passa til kundan. Týdningarmikið er eisini, at skipanin er bílig.



*Esbern Hansen stóð á odda fyri KT-stevnuni seinast. Nú bíðar hann spentur eftir móttøkuni av nýggju Hansoft-skipanini.*

Virksemið hjá Hansoft er annars størri enn so. Fyritøkan bjóðar m.a. tráðleyst internetsamband í Klaksvík, og harumframt umboðar hon prentarar og fjølritarar frá Kyocera Mita, sum verða vístir fram á stevnuni í Norðurlandahúsinum. Av øðrum størri ætlanum, sum Hansoft hevur á stevnuskránni, er ein sporføris-skipan, sum skuldi verið áhugaverd fyri alla fiskivinnuna. Hesa skipan hevur Hansoft ment saman við øðrum.

Annars má sigast, at Esbern Hansen hevur verið har, ið á leikar, tá ið tað um føroyska KT-vinnu ræður. Hann var fyrsti formaður í KT-felagnum, og hann skipaði fyri KT-stevnuni seinast. Royndir hansara í vinnuni hava sannført hann um, at tað, sum vinnuni tørvar í løtuni, er ein portal, sum kann vera staðið á alnetinum, har ið tað almenna leggur alt KT-innkeyp og allar KT-tænastur. Ynski Esberns er ikki minst elvt av, at hann hevur virki sítt í Klaksvík, og at hann tí hevur merkt, at tað kann vera torført at gera seg galdandi, tá ið ein er KT-veitari í útjaðaranum; serliga tá ið tað snýr seg um tænastur til tað almenna.

Hansoft

Stovnað: 1999
Stjóri: Esbern Hansen
Virksemi: Gera skraddaraseymaðar dátugrunnar o.a.




